## Landsliðsmaður deyður

Leygardagin legði sorg seg yvir EM-endaspælið í hondbólti í Eysturríki, tá tað frættist, at fjølbroytti týski landsliðsspælarin, Oleg Velyky, var deyður av krabbameini, bara 32 ára gamal. Upprunaliga var hann úr Ukraina, ið hann umboðaði 59 ferðir, áðrenn hann tann 1. apríl í 2004 fekk týskan ríkisborgararætt. Síðani spældi Velyky 38 landsdystir fyri Týskland, umframt at spæla við HSV Hamburg.



## Løke-málið ikki liðugt

Málið um norska landsliðspælaran, Frank Løke, sum í fjørsummar skrivaði undir sáttmála við bæði kroatiska Zagreb og danska Skjern, og tí fekk karantenu frá europeisku hondbóltssamgonguni, EHF, er enn ikki liðugt, tí bæði feløgini hava kært. Skjern vil hava endurgjald, meðan hvørki Zagreb og Løke ikki vilja hava nakra revsing. Hóast Løke hevur karantenu í Zagreb, spælir hann við Norra í EM.

# Ísland ætlar sær langt

**Tríggjar forðingar – Kroatia, Russland og Noreg – skulu fáast av vegnum, men íslendski landsliðsvenjarin, Guðjón Valur Sigurðsson, trýr veruliga upp á møguleikan**



heri@sosialurin.fo

Heri Símonsen

Íslendingar vóru harmir og skakaðir eftir dystirnar ímóti Serbia og Eysturríki. Ímóti Serbia førdu íslendingar 29-25, men fingu bert javnleik 29-29. Ímóti Eysturríki førdu íslendingar 37-34, men fingu bert javnleik 37-37.

Men leygarkvøldið fall alt upp á pláss hjá íslendingum ímóti Danmark, og nú hyggja teir við spenningi fram ímóti millumumfarinum.

– Vit hava alla tíðina vitað, hvat vit duga, men okkum tørvaði veruliga at røkka hæddunum í spælinum, sum vit rukku ímóti Danmark. Ikki minst í verjuspælinum, segði Guðjón Valur Sigurðsson við íslendska Morgunblaðið eftir dystin.

### Næsta málið

Hann helt, at verjuspælið hjá Íslandi var framúr, og at íslendski málverjin Bjørgvin Gustavson stóð sera væl. Somuleiðis helt hann danir vera ráðaleysar – serliga í seinna hálvleiki, har tað eydnaðist at halda teimum niðri á níggju málum.

Nú Ísland er komið væl víðari, staðfestir Guðjón Valur Sigurðsson, at Kroatia, Noreg og Russland eru góð lið, og at Ísland má spæla upp til sítt besta fyri at koppa teimum. Men hann heldur, at íslendska tjóðin kann síggja fram til nakrar spennandi EM-dystir.

– Vit eru komnir í millumumfarið, og hava tí rokkið okkara fyrsta máli. Tað næsta er at koma í hálvfinaluna, staðfestir íslendski landsliðsvenjarin.



Íslendski landsliðsvenjarin, Guðjón Valur Sigurðsson, hevur nú hálvfinaluna sum næsta málið, Ísland skal røkka í EM-endaspælinum

**EM-kappingin 2010**

| | | |
|---|---|---|
| **Bólkur A** | | |
| 19/01 | Russland-Ukraina | 37-33 |
| 19/01 | Kroatia-Noreg | 25-23 |
| 21/01 | Ukraina-Kroatia | 25-28 |
| 21/01 | Noreg-Russland | 28-24 |
| 23/01 | Kroatia-Russland | 30-28 |
| 23/01 | Noreg-Ukraina | 31-29 |
| **Bólkur B** | | |
| 19/01 | Danmark-Eysturríki | 33-29 |
| 19/01 | Ísland-Serbia | 29-29 |
| 21/01 | Eysturríki-Ísland | 37-37 |
| 21/01 | Serbia-Danmark | 23-28 |
| 23/01 | Eysturríki-Serbia | 37-31 |
| 23/01 | Danmark-Ísland | 22-27 |
| **Bólkur C** | | |
| 19/01 | Týskland-Pólland | 25-27 |
| 19/01 | Svøríki-Slovenia | 25-27 |
| 20/01 | Slovenia-Týskland | 34-34 |
| 20/01 | Pólland-Svøríki | 27-24 |
| 22/01 | Týskland-Svøríki | 30-29 |
| 22/01 | Pólland-Slovenia | 30-30 |
| **Bólkur D** | | |
| 19/01 | Spania-Kekkia | 37-25 |
| 19/01 | Frakland-Ungarn | 29-29 |
| 20/01 | Kekkia-Frakland | 20-21 |
| 20/01 | Ungarn-Spania | 25-34 |
| 22/01 | Frakland-Spania | 24-24 |
| 22/01 | Ungarn-Kekkia | 33-26 |
| **Millumbólkur 1** | | |
| 25/01 | Kroatia-Ísland | 15.00 |
| 25/01 | Noreg-Eysturríki | 17.00 |
| 25/01 | Danmark-Russland | 19.15 |
| 26/01 | Russland-Ísland | 15.00 |
| 26/01 | Kroatia-Eysturríki | 17.00 |
| 26/01 | Noreg-Danmark | 19.15 |
| 28/01 | Noreg-Ísland | 15.00 |
| 28/01 | Russland-Eysturríki | 17.00 |
| 28/01 | Kroatia-Danmark | 19.15 |
| **Millumbólkur 2** | | |
| 24/01 | Týskland-Frakland | 24-22 |
| 24/01 | Pólland-Spania | 32-26 |
| 24/01 | Slovenia-Kekkia | 35-37 |
| 26/01 | Slovenia-Frakland | 15.15 |
| 26/01 | Týskland-Spania | 17.15 |
| 26/01 | Kekkia-Pólland | 19.15 |
| 28/01 | Týskland-Kekkia | 15.30 |
| 28/01 | Slovenia-Spania | 17.30 |
| 28/01 | Pólland-Frakland | 19.30 |

# Fyrsti sigurin í 17 ár

**Talan var um sannan uppvísning, tá íslendingar vunnu sína fyrsta sigur yvir Danmark í einum endaspæli í 17 ár**



heri@sosialurin.fo

Heri Símonsen

Ísland spældi ein framúr dyst ímóti Danmark í í Linz leygarkvøldið og vann eisini uppiborið 27-22 á donsku europameistarunum. Støðan í steðginum var 15-13 til Ísland. Eysturríki vann 36-30 á Serbia, og tað merkir, at Ísland tekur trý stig við sær til millumumfarið. Danmark tekur tvey stig við sær, meðan eysturríksku vertirnir taka eitt stig við sær.

Ísland legði seg á odda 7-2. Beint eftir hetta høvdu danskarar sítt einasta veruliga góða tíðarskeið í dystinum, tá teir vendu 2-7 til 10-7, men so javnaði íslendingar aftur, fóru framum og sleptu ikki takinum aftur. Íslendingar blakaðu tryggar sigrar burtur ímóti bæði Serbia og Eysturríki, men innleiðandi bólkaspælið endaði kortini eydnusamt.

Íslendski málverjin, Bjørgvin Páll Gústavsson, spældi sín lívs dyst og fekk góða hjálp frá íslendsku verjuni. Tað ironiska við tí íslendska sigrinum var, at stóra stjørnan, Ólafur Stefánsson, var merkiliga anonymur og skoraði bara eitt mál í dystinum. Men liðfelagarnir prógvaðu, at Ísland hevur eina framtíð at byggja á.

Talan er um fyrsta sigur íslendinga á Danmark í einum endaspæli í 17 ár. Annars hava liðini spælt nógvar javnleikir og fleiri javnar dystir, har bert eitt mál hevur verið á muni, men leygarkvøldið var ein sjónligur munur.



Íslendski strikuspælarin, Ólafur Guðmundsson, hevur fingið fatur í bóltinum í hornatøkum við Mikkel Hansen í donsku verjuni